gult cyan magenta svart



*Jan Evensen, leitistjóri í Amerada Hess:*

# Vit eru ótrúliga væl nøgdir

Jan Müller



– Vit eru sera væl nøgdir. Vit í Amerada Hess hava fingið eitt operatørskap og eitt øki, sum vit hava stórar vónir til. Øll feløgini i samtakinum eru nøgd. Vit fingu ikki alt tað vit bóðu um. Kappingin hevur verið sera hørð. Tað umráðið, sum allir hava søkt um, er so lítið, og eg haldi, at myndugleikarnir hava gjørt eitt sera gott arbeiði við at fáa hesa kabalina at ganga upp sigur Jan Evensen, stjóri í Amerada Hess.

Teir høvdu tvey primerøki og fingu tað eina. Jan Evensen sigur, at teir nú samstarva við onnur feløg og við myndugleikarnar um at fáa eina boring á sumri næsta ár. Hann vónar, at spurningar um trygd og umhvørvi koma uppá pláss til tíðina, tí teir vilja fegnir seta hol á í juni, juli ella august.

The Faroes Partnership hevur bundið seg til at bora minimun tveir brunnar. Teir hava so eisini eina sera umfatandi umsókn hvat tí føroyska innihaldinum viðvíkur. Talan er um nógvar verkætlanir sum teir nú gera eina ætlan fyri at leggja fyri myndugleikarnar. Hetta snýr seg m.a. um at hækka støðið hjá føroyskum ídnaði, so hann fær luttikið í komandi oljuvinnuni.

Jan Evensen er ómetaliga fegin um tann mátan sum Oljufyrisitingin hevur arbeitt uppá og her serliga Herálvur Joensen. -Hetta er ikki nøkur løtt uppgáva, men tað hava teir so megnað ótrúliga væl. At tað so eisini er gjørt innan fyri ein tíðarkarm, sum vit allir kunnu góðtaka, eri eg eisini ovfarin av, og ikki minst av, at teir hava verið framman fyri tíðina við hesum. Úrslitið av loyvisumfarinum vísir so eisini, at her hevur verið talan um eina skilagóða og rættvísa útbjóðing.

Jan Evensen heldur, at hetta verður ein ótrúliga spennandi prosess framyvir. Hann heldur sjálvur, at teir hava fingið loyvið grundað á tekniska innihaldið og tann føroyska partin. -Tað hevur ikki havt nakað beinleiðis við føroyska felagið at gera. Føroyskir myndugleikar hava megnað at hildið eina javnvág og eina konsekventa linju. Eg haldi ikki vit hava fingið loyvi orsakað av Atlantic Petrolum, men sjálvandi hava teir givið eitt sera gott íkast til føroyska partin.

Jan Evensen sigur seg vera sera ovfarnan av, at Norsk Hydro ikki fekk lisens. Hann kennir ikki smálutirnar í hesum. Fyrr hevur Hydro verið í bólki saman við Amerada Hess og hava havt sera gott samstarv.



# Statoil vil menna útbúgving og gransking

Jan Müller

Geir Jøssang er stjóri hjá Statoil fyri leiting í bretskum, írskum og føroyskum øki. Hann tók vegna AMG-bólkinum (Statoil, Phillips, Veba og Enterprise) ímóti loyvinum í Norðurlandahúsinum. Hann er væl nøgdur við úrslitið av rundnuni, serliga tá hugsað verður um ta sera hørðu kappingina. Tað teir hava fingið liggur innanfyri tað teir hava søkt og eisini millum 1. prioritetirnar. Hann vil ikki siga, um Statoil ætlar at bora í næsta ár, men tað fara teir at avgera innan fyri nakrar vikur. Statoilbólkurin hevur bundið seg til at bora tveir brunnar. Um teir taka boriskipið Vest Navion til Føroya hava teir ikki tikið støðu til enn. Tað borar í Grønlandi í løtuni. Teir eru eisini nøgdir við 9-ára loyvið, sum teir hava fingið saman við Anadarko.

Hvat viðvíkur tí føroyska innihaldinum so fer Statoil at halda fram við at stuðla føroyska útbúgving og gransking. Teir hava longu brúkt nógvar mill. til slíkt endamál. -Vit vilja vera við til at menna hetta, sum kann hava stóran týdning fyri vinnuna og samfelagið.


# Móttøka í Havnar Klubba

Í sambandi við, at
Anne Petersen hevur sín
síðsta arbeiðsdag eftir
44 árum, bjóðar
Føroya Bjór til móttøku fyri
viðskiftafólki og øðrum í
Havnar Klubba

**fríggjadagin 1. september**
**frá 16.00 til 20.00.**




Föroya Bjór
700 Klaksvík
Tel 45 54 54, Fax 45 60 52


gult cyan magenta svart



# Tingmenn droyma allir um landsstýrissess



*Bjarni Djurholm avmyndaður í gjár í Tinganesi*

*Mynd: Jonhard Hammer*

*Hetta heldur 43 ára gamli kollfirðingurin og royndi politikarin Bjarni Djurholm, sum 28. august tekur við starvinum sum nýggjur landsstýrismaður*

Jústinus Leivsson Eidesgaard

Hann er í hvítari nýstroknari skjúrtu, svørtum buksum og slipsi. Vit eru staddir heima hjá Bjarna Djurholm, fíggjarnevdarformanni og tað eru ikki nógvir tímar síðan, at avgerð varð tikin um, at hann skuldi avloysa Finnboga Arge, sum landsstýrismann hjá folkaflokkinum í Tinganesi. Finnbogi er loystur úr starvi í dag og Bjarni Djurholm tekur við nýggja sessinum 28. august. Hann er á veg oman í Tinganes, har hann fyri fyrstu ferð skal avmyndast sum komandi landsstýrismaður við tí eyðkendu bakgrundini úti í Tinganesi.

- Eg haldi, at allir tingmenn droyma um at gerast landsstýrismenn einaferð. Tað er í landsstýrinum, at avgerðirnar verða tiknar, og tú verður meira beinleiðis við at mynda landsins politikk, sigur Bjarni Djurholm.

- Eg haldi heldur ikki, at tað verður so torført at taka yvir eftir Finnboga Arge. Nógv mál eru loyst úr lagdi seinastu tvey árini, og eg havi eitt gott støði at standa á.

## Avgjørdur politikkari

Bjarni Djurholm er kendur sum ein markantur politikkari. Hann hoyrist, og hann hevur ofta avgjørdar meiningar um týdningarmikil mál. Mótvegis Finnboga Arge, kunnu vit rokna við at fáa ein eitt sindur meira harðmæltan landsstýrismann og saman við nýggja landsstýrismanninum hjá Tjóðveldisflokkinum Tórbjørn Jacobsen kunnu vit rokna við, at løgmaður, Annfinn Kallsberg og Høgni Hoydal av og á verða noyddir at slætta sjógv.

»Undir fýra eygum haldi eg meg sjálvan vera diplomat«, sigur Bjarni Djurholm.

Tað eru nøkur mál sum Bjarni Djurholm fer at leggja seg eftir at loysa, mál sum Finnbogi Arge hevur arbeitt við, men sum ikki er heilt rokkin enn. Á samferðsluøkinum er tað serliga loysnin at projektera og byggja nýtt skip til Suðuroyarsiglingina. Nýtt skip til Sandoynna er eitt mál sum longu er í gongd, ferjan fer vónandi at sigla um ársskiftið, og sambandið um Vestmannasund stendur ovarlaga á dagsskránni. Eisini hyggur nýggi landsstýrismaðurin frameftir, tá tað snýr seg um sambandið um Leirvíksfjørð og annars sambandi í útjaðaraøkinum.

– Eg havi ofta verið skýrdur fyri at verið ein miðstaðarmaður, men eitt vælútbygt miðstaðarøkið ger tað eisini liviligari hjá fólki í útjaðaranum. Arbeitt verður við at orða ein útjaðarapolitikk. Skal útjaðarin hava møguleika at mennast, so er neyðugt at skapa nakrar fortreytir, soleiðis at tey smáu plássini kunnu hava nakað at bjóða sínum borgarum. Fyrsta fortreytin fyri hesum er, at samferðsluviðurskiftini eru í lagi og hesi halta manga staðni í dag. Eitt nú eru stórir samferðslutrupulleikar á teimum smáu plássunum í Norðoyggjum, sigur Bjarni Djurholm.

- Eg eri sjálvur av tí fatan, at tað í sær sjálvum ikki er negativt, at vit hava eitt kraftarmikið miðøki. Eg haldi, at eitt vælútbygt miðøki kann gera tað liviligari í útjaðaranum, soleiðis at vit ikki koma í ta støðu, at hatta og hatta skal ikki vera har ella har. At vit ikki byrja at kappa fyri fáa alt fordeilt javnt í samfelagnum, sigur Bjarni Djurholm,

## Vestmannasund

Bjarni Djurholm heldur, at undirsjóartunnilin undir Vestmannasund fer eisini at hava aðra ávirkan á føroyska samfelagið enn at verða farleið undir sundinum.

- Eg trúgvi, at óvanligi hátturin sum hevur verið nýttur at fáa fast samband um Vestmannasund fer at slóða fyri einum øðrum hugburði, tá tað snýr seg um almennar íløgur. Við royndunum frá Vestmannasundi, so trúgvi eg, at tað næsta man fer at hyggja eftir, er fast samband um Leirvíksfjørð, sigur Bjarni Djurholm,

– Stóra takið komandi ár verður at fáa eitt nýtt skip til Suðuroynna projekterað og síðan at fáa løgtingsins vælvild til fígging av skipinum. Suðuroyggin er komin í eina trongstøðu, at hon er endað í somu støðu í dag, sum miðstaðarøkið var fyrst í seinastu øld, tá var næstan alt virksemi í landinum í Suðuroy. Suðuroyggin er illa fyri, eisini hvat vegakervi viðvíkur, so har er nógmikið at tríva í, sigur Bjarni Djurholm.

## Familjumaður

Bjarni Djurholm er føddur i Kollafirði og kom eftir lokna realskúlagongd í Vestmanna til Havnar í Hoydalar. Hann var eitt stutt skeið niðri og læs og kom síðan heim á Læraraskúla. Hann var lærari í tvey ár á Spesialskúlanum og fór síðan á Tekniska Skúla, har hann var lærari í 12 ár. Hann er í dag varaskúlastjóri á Eysturskúlanum, men hevur verið í farloyvi seinastu árini orsakað av politiska arbeiðinum. Eitt nú sum eygleiðari í stóru bankakanningini. Bjarni er giftur Eydnu, sum starvast á Føroya Tele. Tey eiga trý børn, tey eru Tummas Pauli, 19 ár, Annika, 12 ár og Monika Maria 9 ár. Bjarni Djurholm býr Millum Gilja í Hoyvíkshaganum.

**Lesið meira á síðu 26**


Bassi
er afturkomin
úr summarfrí ...




**... og hann er úthvíldur og fullur av góðum hugskotum - m.a. fer hann skjótt at halda føðingardag**

**Tit hava nakað at gleða tykkum til!**

FØROYA SPARIKASSI

www • 85 • fo